**Vegna Føroya Skiftirætt verða hesar ognir lýstar til sølu**



# Sethúsognin Álvastíggjur 11, Tórshavn

**Grundøki:** 517 $m^2$. Kjallari og miðhædd uml. 100 $m^2$ hvør og loftshæddin uml. 75 $m^2$.
**Kjallarahædd:** vindfang, gongd, fýrrúm, eitt stórt og eitt minni rúm, ið hava verið nýtt til skrivstovu, køkur.
**Miðhædd:** trappu-uppgongd úr kjallara uppá loft, gangur, køkur, spískamar, stova, toilett, kamar, lítil hjallur.
**Loft:** 2 sovikømur, stór loftsstova, baðiverilsi.
**Byggiár:** 1969.

Húsini standa í friðarligum umhvørvi.

Garður er gjørdur um stykkið.

# Hús og trøð í Nesvík

Ognin er matr. nr. 4, Streymnes.

Húsini eru 36 $m^2$ við kjallara-, stovu- og loftshædd við tilbygningni uml. 12 $m^2$.

Trøðin er uml. 5.000 $m^2$

Tað stendur skiftirættinum frítt at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av.

# Trøð í Norðragøtu

Um hóskandi boð fæst, verður ein ódyrkað trøð í Norðagøtu seld. Trøðin er 11.800 $m^2$.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Fríðu Patursson, frp@advlaw.fo

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn**
Halgir Winther Poulsen , adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Tlf. 31 11 45

# ALMANNASTOVAN

## Stuðulsfólk

**Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki. Sum stuðul fært tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.**

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
**Fylgjarauppgávur, stimbran og umlætting.**

**Størvini eru hesi:**

**NORÐOYGGJAR**

1) - stuðulsfólki til 13 ára gamla rørslutarnaða gentu, **10 tímar um vikuna.**
Arbeiðið fevnir um at gera venjingar við gentuni og fara við henni til viðgerð. Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá gentuni.
Neyðugt er at tann ið settur verður hevur koyrikort.
Játtanin er fyribils galdandi til 30.06.04

2) - stuðulsfólk til eina 15 ára gamla gentu.
Arbeiðstíðin er skiftandi dag -kvøld og okkurt vikuskifti, at fara við gentuni til ymisk frítíðartiltøk.
Tímatali er **12 tímar um vikuna.**
Játtanin er fyribils galdandi til 30.06.04

3) **vegna ov fáar umsóknir lýsa vit av nýggjum eftir stuðulsfólki.**
- at stuðla og stimbra einum 11 ára gomlum drongi við venjingum og spæli.
Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá dronginum.
Tímatali er fyribils **30 tímar um vikuna.**
Játtanin er fyribils galdandi til 30.06.04

**VÁGAR**

4) - stuðulsfólk til 13 ára gamlan rørslutarnaðan drong, **15 tímar um vikuna.**
Arbeiðið fevnir m.a. um at fara við honum til viðgerðir og til frítíðartiltøk.
Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá dronginum.
Játtanin er fyribils galdandi í eitt ár.

**EYSTUROY**

5) - at stuðla og hjálpa einum 8 ára gomlum fjølbrekaðum drongi og fara við honum til viðgerð og onnur tiltøk.
Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá dronginum.
Arbeiðið verður gjørt við tilknýti til Tilhaldið í Rók í Saltnesi.
Tímatali er fyribils **25 tímar um vikuna.**
Ynskiligt er at tann ið settur verður hevur koyrikort.

6) - at stuðla og stimbra einum 8 ára gomlum drongi og hjálpa honum í samskiftinum við onnur børn.
Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá dronginum.
Tímatali er **20 tímar um vikuna**
Játtanin er fyribils galdandi til 30.06.04

7) - at stuðla og stimbra einum 1 ára gomlum barni og fara við honum til viðgerðir.
Tímatali er **31 tímar um vikuna**
Játtanin er fyribils til 01.04.04

8) - at stuðla og stimbra einum 5 ára gomlum drongi og hjálpa honum í samskiftinum við onnur børn. Eisini fara við honum til viðgerðir.
Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við dagrøktina.
Tímatali er **20 tímar um vikuna**
Játtanin er fyribils til 31.12.04

9) - at stuðla og menna, við spæli og venjingum, einari 9 ára gamlari gentu við autismu.
Arbeiðstíðin er aftaná skúlatíð hjá gentuni og fer arbeiðið fram í einum tilhaldsstað fyri børn og stuðlar.
Tímatali er **21 1/2 tíma um vikuna**
Játtanin er fyribils til 30.06.04

**TÓRSHAVN**

10) - at stuðla, hjálpa og fara við eini 12 ára gamlari gentu til ymisk frítíðartiltøk. Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá gentuni og fer arbeiðið m.a. fram í Bridgehúsinum, íð er eitt tilhaldsstað fyri stuðulsfólk og børn.
Tímatali er **20 tímar um vikuna.**
Játtanin er fyribils galdandi til 31.12.03

11) - at stuðla, hjálpa og fara við einum 15 ára gomlum drongi til ymisk frítíðartiltøk. Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá dronginum.
Tímatali er 10 -15 tímar um vikuna.
Játtanin er fyribils galdandi til 30.06.04

12) - at stuðla einum 3 ára gomlum fjølbrekaðum drongi á allan hátt, við venjingum og spæli og fara við honum til viðgerð.
Tímatali er **20 tímar um vikuna seinnapart.**
Ynskiligt er, at tann ið settur verður hevur koyrikort.

Setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Ragnhild Dahl á tlf. nr. 353510, gerandisdagar millum klokkan 09.00 og 15.00.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu verða Almannastovuni, J. Broncksgøta 27, Postboks 3096, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 15.09.2003

**Í umsóknini skal vera tilskilað uppgávunummar.**

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!
www.sosialurin.fo



## Musikkskúlaskipanin

### Royndir verða í november 2003

Royndir í ljóðførisspæli og sangi verða í november 2003. Próvdómari frá **Associated Board of the Royal Schools of Music** í London kemur higar, og tulkur er til staðar.

**Endamál:**
Royndirnar geva næmingi møguleika at seta sær ávegis mál, og fáa eina meting eftir aljóða støði. Prógv verður givi, tá ið royndin er staðin. Minsta krav er 100 av 150 møguligum stigum.

### Ummæli og provtøkur

- **Ummælisroynd fyri byrjarar,** skrivligt ummæli verður givið beinavegn.
- **Ummælisroynd fyri tónleikarar eldri enn 21 ár,** sum ynskja eitt óheft, professionelt skrivligt ummæli og eina samrøðu við próvdómaran.
- **Próvtøka á stigi 1, 2, 3, 4 og 5.** Royndirnar umfata framførslu og hoyrilæra.
- **Próvtøka á stigi 6, 7 og 8.** Prógv í skrivligari teori á 5. stigi krevst.
- **Skrivligar próvtøkur í teori** eru tríggjar ferðir um árið.
- **Próvtøkur á konservatoriistigi** innan trý øki: framførslu, undirvísing og leiðslu. Umfatar skrivligt avrik á enskum, munnliga roynd og framførslu.

### Provtøkugjøld

| **Í ljóðførisspæli ella sangi** | **Í skivligari teori** |
|---|---|
| Ummælisroynd fyri byrjarir kr. 275,- | Stig 1 kr. 195,- |
| Stig 1 kr. 335,- | Stig 2 kr. 195,- |
| Stig 2 kr. 380,- | Stig 3 kr. 195,- |
| Stig 3 kr. 380,- | Stig 4 kr. 255,- |
| Stig 4 kr. 455,- | Stig 5 kr. 255,- |
| Stig 5 kr. 455,- | Stig 6 kr. 325,- |
| Stig 6 kr. 525,- | Stig 7 kr. 325,- |
| Stig 7 kr. 610,- | Stig 8 kr. 325,- |
| Stig 8 kr. 670,- | |

Ummælisroynd fyri tónleikarar eldri enn 21 ár kr. 455,-
Próvtøka á konservatoriistigi millum kr. 1.360,- og 6.400,-

**Tilmelding í seinasta lagi 25. september, teoriroynd tó 19. september,** hjá Musikkskúlaskipanini, Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn, tlf 316462, fax 316991, teldupost: martin@mmr.fo.
Meira fæst at vita hjá Martin Mouritsen, leiðara á tlf. 216462

Haldarar hjá Sosialinum
SUM IKKI FÁA LEYGARDAGSBLØÐINI, VERÐA BIÐIN UM AT RINGJA TLF. 229725 LEYGARDAG MILLUM KL. 11 OG 14
Prentmiðstøðin

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar

# EYDNUHJÓL

Eydnuhjól verður við Gjógv sunnudagin 21. september 2003 til frama fyri bygdarhúsið.

Tey, ið ynskja at stuðla tiltakinum, kunnu venda sær til ein av nevndarlimunum:

Olaf Fríðheim, tlf. 423346
Kristian Jákup Joensen, tlf. 423325
Sofus Johannesen, tlf. 423398

*Gjáar Samkomuhús*



Sosialurin -tað loysir seg

# ÚTBJÓÐING

Fyri Mentamálaráðið verður byggibúning fyri Miðnámsskúla og meginbókasavn í Suðuroy boðið út í almennari lisitatión.

Arbeiðið fevnir í stuttum um avgrevstur, spreinging, uppfylling og planering fyri miðnámsskúla og meginbókasavn, 100 m av vegi og 2500 $m^2$ av parkeringsøki.

**Høvuðsnøgdirnar eru hesar:**

| | | |
|---|---|---|
| Avgrevstur | uml. | 5.000 $m^3$ |
| Spreinging | uml. | 15.000 $m^3$ |
| Uppfylling | uml. | 6.000 $m^3$ |
| Planering | uml. | 3.000 $m^2$ |

Lisitatión verður mánadagin 29. september 2003 kl. 13.30 á komunuskrivstovuni í Vági. Tilboðini skulu merkjast: Miðnámsskúla og meginbókasavn í Suðuroy.

Útbjóðingartilfar kann bíleggjast, við at flyta kr. 2.000 á konto nr. 139 753 4 í Føroya Sparikassa, upplýsast skal navn og kontonr. á virkinum, sum bíleggur útbjóðingartilfarið. Tilfarið verður sent út 5. september.
Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent til Arkitektavirkið Árni Winther, Niels Winthersgøta 4, 100 Tórshavn, í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

Arkitektaarb. og Projeteringsleiðsla:
**Arkitektavirkið Árni Winther Sp/f**
Niels Winthersgøta 4 · FO-100 Tórshavn
tlf. 314190 · fax 314197 · mail: awinther@awinther.fo
Ráðgevandi verkfrøðingar:
**Landsbyggifelagið P/f**
Grønlandsvegur 5 · FO-100 Tórshavn
tlf. 314744 · fax 310744 · t-postur: lbf@lbf.fo

# Pedagogur til Dagstovnin í Fuglafirði

Til stovuna í Króki verður søkt eftir 1 pedagogi 40 t. viku, at byrja 1. oktober 2003 (ella eftir nærri avtalu).

Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

Dagstovnurin er ætlaður 60 børnum, og er stovnurin skipaður í tvey hús við eini barnagarðsstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Juliannu Næs leiðara á tlf. 225222/444940.

Um eingin pedagogur søkir starvið, kunnu hjálparfólk verða sett fyribils.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 17. september kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður 2. september 2003

**Fuglafjarðar býráð**